**Tíðargreinin: eitt íkast til føroyska orðaskiftið**
Sosialurin hevur tíðargrein í blaðnum týsdag og hósdag. Hevur tú hug at gera títt íkast til føroyska kjakið í 2008? - Send eina grein til post@sosialurin.fo - Kravið er, at greinin er á leið 6000 tekn og skrivað í essay stíli



TÍÐARGREININ
*Hanus Kamban*

# Ísrael og fascisman

**Ísraels framferð í Gaza kann - púra órættvíst - kom at verða jøda-dóminum at bága**

Ísambandi við tað ræðuliga kríggið í Gaza fari eg at loyva mær at bera fram nakrar fáar viðmerkingar, ikki í nakrari vón um at linna um hesa blóðdálkaðu blindgøtu, men tí einum tykir, ikki bara at bíløtið, vit fáa frá fjølmiðlunum, sum heild bæði er ov eintáttað og ov grunt, men at summar upplýsingar eru beinleiðis skeivar.

Tað verður tikið uppaftur ferð eftir ferð, bæði í miðlum og av ríkisleiðarum, at Hamas breyt vápnahvíldina við Ísrael og á henda hátt íbirti hetta seinasta kríggið. Hetta er ikki í samsvari við tað, sum Robert Fisk, blaðmaður hjá *The Independent* og serkønur í Miðeysturs nútíðarsøgu, førir fram. Hann sigur (sí Information 8. januar), at Ísrael breyt vápnahvíldina, fyrstu ferð tann 4. november 2008, tá ísraelar drópu seks palestinar og aftur tann 17. november, tá teir bumbaðu fýra palestinar til deyðis.

Tað var við øðrum orðum, sambært Fisk, ikki Hamas, men Ísrael, sum íbirti kríggið. Men um sannleikin var ein annar, hvat so? Spurdu jødar pent og fólkaliga Nazi-Týskland um loyvi, áðrenn teir fóru undir sín gitna uppreistur í ghettoini í Warzawa undir 2. heimsbardaga?

Undirritaði telist ikki millum teirra, sum á nakran hátt kann taka undir við yvirgangi, annaðhvørt hann verður framdur av Hamas, einum Menachem Begin ella tí ísraelsku stjórnini. Og hvat Hamas viðvíkir, so hevði tann gitni palestinski bókmentafrøðingurin og høvundurin Edward W. Said helst rætt, tá ið hann førdi fram, at palestinar onga veruliga leiðslu hava. Samstundis tykist týðiligt, at ein felagsskapur sum Hamas er Ísraels egni alvi, skaptur av áralongum ísraelskum yvirgangi.

Sjálvt Gaza-málið er ov stórt til at verða viðgjørt í stuttari viðmerking. Men tað tykist greitt, at tey, sum ikki skilja sjálva forsøguna, kunnu als ikki úttala seg við skili um hendingarnar beint nú. Og forsøgan er sambært ísraelskum søgufrøðingum tann, at ísraelar frá fyrst í desember 1947, t.e. eitt hálvt ár áðrenn ríkið Ísrael varð sett á stovn, framdu eina leingi og ruddiliga fyriskipaða etniska útreinsing móti palestinum.

Teir rændu teirra land, jørð, hús, olivingarðar, viðalundir, ofta eisini leysar ognarlutir, og róku eigararnar burtur við harðskapi, jagstran og blóðbaðum. Frá 1940 høvdu teir skrásett allar palestinskar bygdir, við upplýsingum um moskur, skúlar, viðalundir, hvar fólk búðu, hvat tey áttu og hvar tey stóðu politiskt. Tað var tí ómakaleyst, tá ið løtan kom, at eyðmerkja politiskt medvitnar menn, sum eitt nú vóru limir í politiskum flokkum, og skjóta teir straks uttan víðari roks. Hetta er nett sama framferð, sum Sovjet brúkti í Baltikum undir øðrum heimsbardaga, nazistar í Póllandi frá 1939 og serbar í Jugoslavia fyrst í 90-árunum í farnu øld.

Tað eru eftirkomarar hjá hesum fólkum, sum nú búgva í Gaza. Hesi fólk, ung sum gomul, vita øll, hvussu ísraelar rændu landið og ognirnar hjá teirra forfedrum. Teirra kenslur eru ikki øðrvísi enn tær, sum okkara skald H.A. Djurhuus lýsir við hesum orðum:

*Her vit hoyrdu móðurrødd,*
*bórust her á móðurarmi,*
*lógu trygt at móðurbarmi,*
*vóru bæði fødd og klødd ...*

Landið er rænt, og rænt so ruddiliga (og her hava ísraelar dugað betur enn t.d. nazistarnir), at sjálvt staðanøvnini eru útruddað og nýggj sett í staðin. Og vitandi um hetta mentanar- og landsrán kunnu palestinar nú hyggja at, meðan ísraelskir hermenn karva teirra børn sundur ella spreingja tey í smápettir.

Mangir eygleiðarar tykjast í dag at vera bilsnir um, at ísraelskir hermenn fara fram við so blóðugum harðskapi móti m.a. konum og børnum. Men í hesum er einki nýtt og einki løgið. Hetta hevur eyðkent teirra framferð, líka síðani teir fyrst í desember 1947 fóru undir sína væl fyriskipaðu etnisku útreinsing.

Í hesum sambandi kann vera hugvekjandi at hyggja at Ísraels søgu. Tann ágangs- og harðskaparpolitikkur, sum frá byrjan var Ísraels aðalmerki, fekk eina sjónliga bæði politiska og hugmyndafrøðiliga herðing, tá ið Likud, við Menachem Begin á odda, kom fram at valdinum í 1977.

Og her koma vit til eitt áhugavert søguligt samband. Søgulig verk eru skrivað um samskiftið millum Haj Amin Al-Husseini, ið var palestini og stórmufti av Jerusalem, og nakrar av nazismunnar oddamonnum. Minni kent er sambandið millum nakrar av zionismunnar slóðbrótarum og tríatiáranna totaliteru rørslur.

Likud er sprottin úr eini revisionistiskari zionistrørslu frá fyrru helvt av 20. øld. Hennara leiðari var Vladimir Jabotinsky, ukrainskur jødi, úr Odessa. Sum persónsmenska var Jabotinsky kompleksur og neyvan eintýddur, men undir honum kom henda rørsla í síni floksmentan og hugmyndafrøði at liggja so nær fascismuni og Benito Mussolini, at hon av mongum varð rópt fascistisk.

Ungmannarørslan Betar hjá Jabotinsky hevði t.d. í 30-árunum ein sjómannaskúla í Civitavecchia í Italia, har rópt varð á samkomum, í rituellum høpi: *Viva L´Italia! Viva Il Re! Viva Il Duce*! Og Mussolini fagnaði sínum tilbiðarum, rósti "fascistinum" Jabotinsky og tók heilhugaður undir við hansara politikki.

Men ikki nóg mikið við tí. Burtur úr rørsluni hjá Jabotinsky flusnaði ein klovningsbólkur, róptur LEHI (ella Stern harkaliðið), hvørs leiðari var Avraham Stern. Í nøkur ár, og líka til 1941, royndi hesin bólkur at fáa í lag samstarv við Adolf Hitler. Dreymurin var at skapa eitt serligt vinarband millum eitt totalitert jødiskt Palestina og Das Reich. Yitzhak Shamir, seinni forsætisráðharri hjá Likud, var millum teir fremstu limirnar í hesum bólki.

Tá ið tann ísraelski herurin Haganah framdi sína etnisku útreinsing frá 1947, hevði tann friðarliga palestinska






*Menachem Begin (1913-92), oddamaður í yvirgangsbólkinum Irgun, seinni forsætisráðharri í Ísrael. Hansara rørsla varð mett at vera nær skyld við fascismuna og nazismuna. Hansara skuggi sveimar yvir nútíðar ísraelskum politikki*

Tíðargreinin